## Umsóknarfreist hjá NORDPLUS er 15. oktober 2009

Skúlar, stovnar, lærarar, námsfrøðingar og onnur, ið ynskja at fyrireika eina umsókn til næstu umsóknarfreist hjá Nordplus, ið er 1. mars 2010, kunnu søkja stuðul til fyrireikingarvitjanir. Freistin í ár er 15. oktober, og er galdandi fyri Nordplus Junior og Nordplus Vaksin skipanirnar. Endamálið við eini fyrireikingarvitjan er at hitta samstarvsfelagar úr Norður- og Baltalondum, og í felag fyrireika eina umsókn til næsta ár. Tílík umsókn kann til dømis vera ein lýsing av verkætlan, temasamstarvi, námsferð, skiftislestri, lesiætlan, umbýti av skúlaflokkum, stovnsetan av netverki og øðrum útbúgvingarsamstarvi. Stuðulin, ið søkjast kann um, er til ferðing og uppihald í einum av luttakandi londunum. Ein fyrireikingarvitjan, ferðing íroknað, er í mesta lagi fimm dagar. Bert tvey umboð úr hvørjum skúla ella stovni kunnu søkja ferða- og uppihaldsstuðul. Á Nordplusheimasíðuni, ið er www.nordplusonline.org, er ein nágreinilig vegleiðing um hvussu ein søkir.



# Vilja hava vøkstur heldur enn niðurlaging

VINNA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Oddafólk í høvuðsstaðnum taka seg nú saman fyri at arbeiða fyri vinnuligum og samfelagsligum vøkstri. Fríggjadagin hittust nøkur leiðandi vinnulívsfólk, fakfelagsfólk og politikkarar fyri at tosa um, hvussu farast kann undir eina skipaða vakstrarætlan fyri høvuðsstaðin heldur enn bara passivt at hyggja at, meðan tíðirnar versna, og skattakrónurnar minka.

Og í blaðnum í dag hevur formansskapurin í Tórshavnar kommunu eina tíðargrein, har mælt verður til eitt tætt samstarv um eina tílíka ætlan. Greinin er søgulig, tí hon er skrivað av borgarstjóranum og báðum varaborgarstjórunum í felag – tvs. av umboðum fyri bæði samgonguna og andstøðuna í Tórshavnar kommunu.

- Vit, sum varða av skattakrónunum hjá borgarunum, skulu sjálvandi vísa ábyrgd og tryggja, at so nógv sum tilber fæst fyri hvørja teirra. Men vit vísa eisini ábyrgd, tá vit bretta upp um armar til tess at fáa nýggjan vøkstur og nýggjar skattakrónur, siga borgarstjórin og báðir varaborgarstjórarnir í felags tíðargreinini.

- Vit kunnu kenna núverandi støðuna sum eina so stóra hóttan móti okkum, at vit missa pippið og motivatiónina til at gera nakað. Ella vit kunnu halda avbjóðingina vera spennandi og lata hana inspirera okkara politiska og fakliga ítróttaanda. Vit kunnu enntá síggja brotið við gomul mynstur sum nýggjar og ótroyttar vinnuligar møguleikar. Í Tórshavnar kommunu ivast vit ikki í, at vit skulu leggja dent á avbjóðingarnar og møguleikarnar, skriva Heðin Mortensen, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

### Kappast við útlendskar metropolar

Formansskapurin vísir á, at allir flokkar í Tórshavnar Kommunu hava í fleiri ár arbeitt fyri at menna ein dynamiskan høvuðsstað við nøktandi barnaansing og góðum mentanartilboðum, ungdómsvirksemi, skúlum, ítróttaøkjum osfr.

- Eitt fjøltáttað samfelag við ríkum mentanartilboðum og góðum sosialum virðum er í nútíðar samfelagnum fortreytin fyri vinnuligari og búskaparligari framgongd. Tað er heilt einfalt hetta slagið av samfelag, sum dregur talentini til sín, og tað eru talentini, sum menna nýggjar eins væl og verandi vinnur, sigur formansskapurin í teirri óvanligu tíðargreinini.

- Vit mugu minnast til, at høvuðsstaðurin í hesi støðu ikki kappast við aðrar føroyskar kommunur, men við útlendskar metropolar sum Keypmannahavn, Århus, Reykjavík, Stockholm ella London, har nógvir føroyingar trívast væl og standa seg væl við góðum størvum.

### Skipað vakstrarætlan

Sambært formansskapinum í Tórshavnar kommunu er neyðugt hjá øllum pørtum í kommununi at gera uppaftur meira, nú tað sansar at búskaparliga og fíggjarliga:

- Ítøkiliga kunnu vit staðfesta, at verandi vinnur hava sítt at dragast við. Harafturat er høvuðsvinnan eyðkend av nógvum handaligum arbeiði, ið sum kunnugt hevur lyndi til at flyta til fjarskotin lond. Tað allarversta er vandin fyri, at tær bestu talentirnar rýma av landinum, og at vit ikki fáa teir vælútbúnu og royndu útisetarnar við áræði og drívmegi heim aftur, verður sagt. Meira generelt ber okkum heldur ikki til at skáka okkum undan teimum greiðu vegleiðingunum frá bæði heimsmarknaðinum og vinnufrøðingum um, at vit mugu dúva upp á vitanartyngri og meira nýskapandi vinnur.

Høvuðsstaðarkommunan fer nú at ganga á odda við eini skipaðari vakstrarætlan. Býráðslimir úr øllum flokkum í býráðnum taka undir við arbeiðinum við vakstrarætlanini, og kommunan ætlar at samstarva við bæði vinnuna, arbeiðsmarknaðin, útbúgving, gransking og mentan.

Fríggjadagin hittust so nakrir vinnulívsleiðarar, fakfelagsleiðarar, fólk á vitanarstovnum og aðrir leiðarar saman við býráðslimunum og stjórum í Tórshavnar kommunu at seta skjøtul á arbeiðið.

Sí tíðargreinina á síðu 13.


samskip



> Samskip søkir eftir formanni til frystigoymsluna í Kollafirði

**Starvslýsing:**
Sum formaður fært tú høvuðsábyrgd av øllum tí dagliga arbeiðinum á goymsluni. Tú kemur eisini at hava ábyrgd av, at skrásett verður í goymsluskipanini á fullgóðan hátt. Formaðurin syrgir í hesum sambandi eisini fyri, at mannagongdirnar framhaldandi vera mentar í HACCP, góðskuskipanini, til tess at tryggja, at heilsufrøðilig krøv og kundans ynskir verða gingin á møti.

**Starvskrøv:**
Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, hevur góð samstarvs- og samskipanarevnir og dugir at samskifta við umhugsni – eisini tá ið harðast leikar á. Eisini vænta vit viðkomandi telduførleika og royndir.

**Seinasta freist** at søkja er 03. juli kl. 16.00.
Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv í einum dynamiskum kappingarumhvørvi
- Eitt óformelt og virkið arbeiðsumhvørvi
- Góðar starvsfelagar og góðar arbeiðsumstøður

**Meira kunning:**
Hevur tú spurningar til starvið, ring vinarliga til Niels Madsen, deildarleiðara hjá Samskipum í Kollafirði, á tlf. 47 77 77 ella skriva til t-post niels.madsen@samskip.com

Løn sambært avtalu.

**Umsókn skal sendast til:**
Samskip P/F
Bryggjan
FO-410 Kollafjørður

ENNEMM / SÍA / NM38335

> **Fyritøkan**
Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er ein tann størsta bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.